# Lady mundi druknað…

HUNDAR

*Vilmund Jacobsen*

*vilmund@sosialurin.fo*

Hundurin Lady, sum vit síggja vinstrumegin á hesi myndini, var deyðanum nær, tá ið ein ungur maður á Toftum um 21.30-tíðina seinasta hóskvøld varnaðist, at okkurt lá og svam aftur og fram í bátahavnini í Oyrunum.

Maðurin gekk oman á innasta armin, og har sá hann, at hetta var ein illa fyrikomin hundur. Hann rópti á hundin, sum beinanvegin svam ímóti manninum. Skjótt eyndaðist at fáa fatur á reimini, sum hundurin hevði um hálsin og hála hann uppá turt.

Rennvátur stóð hann har og orkaði næstan ikki at flyta seg. Skjótt kom tó lív í aftur, tá ið ein annar hundur, sum var har í nánd, kom oman ímóti. Tá ið teir høvdu snoddað eina løtu at hvørjum øðrum, fóru teir báðir spákandi niðan gjøgnum bygdina.

Neyðars Lady hevði ikki sloppið upp á land aftur við egnari hjálp, tí ongastaðni í Oyrahavnini er nakar bátadráttur longur. Høgur kantur er allastaðni uppfyri í øllum trimum hyljunum – og neyvan hevði hundurin funnið uppá at svomið heilt út úr Oyrahavnini og kropið sær niðan undir gamla Turkihúsið.

Sunnudagin, tá ið fótbóltsdystur var á Svangaskarði, møttu vit aftur Lady – hesaferð saman við hvølpinum, Charlie.

Tá ið genturnar á myndini, Harriet og Ruth, sum ikki vistu um hendingina við Lady í Oyrahavnini, hoyrdu søguna, takkaðu tær fyri bjargingina.

Vit spurdu tær, hvør eigur Lady – og Ruth, sum situr høgrumegin á myndini, var skjót at svara:

- Omma!

Lady sá út til at hava tað gott, men kom ungi maðurin ikki av tilvild fram við bátahylinum seinasta hóskvøld, hevði fitti hvølpurin, Charlie, neyvan sæð mammu sína aftur á lívi.

Genturnar høvdu einki ímóti at lata seg avmynda saman við Lady og Charlie.



*Harriet og Ruth saman við tíkini, Lady og hvølpinum, Charlie*
*Mynd: Vilmund Jacobsen*

## VEÐRIÐ

Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið




**Veðrið í dag:**
Gul til stívt andøvsgul av landnyrðingi og yvirhøvur turt og sólglottar. Hitin millum 10 og13 stig.




**Veðrið hósdagin:**
Andøvsgul upp í ein strúk av landnyrðingi og norði og yvirhøvur turt og sólglottar. Hitin millum 8 og 11 stig.




**Veðrið fríggjadagin:**
Andøvsgul upp í ein strúk av norði og ælingur, men eisini sólglottar. Hitin millum 7 og 10 stig.

**Veðrið leygardagin og sunnudagin:**
Gul til stívt andøvsgul av norði, seinni minni vindur av útnyrðingi og vestri. Okkurt ælið, men eisini sólglottar og hitin millum 6 og 10 stig.

### Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | 9 |
| Nuuk | 10 |
| Qaqortoq | 12 |
| Ammassalik | 9 |
| Saint John's | – |
| Halifax | – |
| Reykjavík | 14 |
| Seyðisfjørður | 10 |
| Tórshavn | 12 |
| Lerwick | 14 |
| Aberdeen | 16 |
| London | 21 |
| Tromsø | 13 |
| Bergen | 16 |
| Oslo | – |
| Stokkhólm | 18 |
| Keypmannah. | 20 |
| Helsinki | 15 |
| Moskva | 21 |
| Berlin | 24 |
| Warzawa | 25 |
| Kiev | 23 |
| Bukarest | 23 |
| Paris | 23 |
| Madrid | 27 |
| Róm | 27 |
| Malorca | 32 |
| Athen | – |
| Malta | 30 |
| Tunis | 31 |
| Beijing | 28 |
| New Dehli | 32 |
| Bangkok | 32 |
| Jakarta | 31 |
| Sydney | 13 |
| New York | 21 |
| Miami | 29 |
| Los Angeles | 22 |
| Meksikobýur | 19 |
| Panama | – |
| La Paz | 12 |
| Rio de Janeiro | – |
| Buenos Aires | 13 |

### LUFTTRÝSTIÐ




Eitt hátrýst, 1014 hPa. norðan fyri Ísland stendur mestsum í stað. Eitt lágtrýst, 1000 hPa. við Lofoten grynnist.




Lágtrýstið sunnan fyri Írland fer í landnyrðing. Ein hátrýstryggur frá Azorunum til Grønlands stendur mestsum í stað og mennist.

### HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 16/08 kl. 06⁰⁰–17/08 kl. 06⁰⁰. Hitin í gjár: 11,3°
Minsti hiti máldur í aug.: 0,2° - Mesti hiti máldur í aug.: 22,0°

### AVFALLIÐ




Avfallið: 0,3 mm – mált frá 16/08 kl. 06⁰⁰–17/08 kl. 06⁰⁰
Avfallið higartil í august: 15,3 mm


I EINUM SAMFELAG HAR TEY VEIKASTU HAVA TAÐ GOTT, HAVA ØLL TAÐ GOTT

WWW.JAVNI.FO

JAVNI






Klaksvíkar Sjúkrahús tlf. 455463
Landssjúkrahúsið tlf. 311397
Suðuroyar Sjúkrahús tlf. 371133
www.gevidblod.fo


## VESTFALLSKYRRINDI

11. aug.: Mánin longst frá jørðini
16. aug.: Tendring
23. aug.: Fyrra kvarter
27. aug.: Mánin næstur jørðini

Kelda. Álmanakkin 2004

| Dagur | Suðuroyar-/Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/Sundalagnum fp. | sp. | Vestmannasundi fp. | sp. | Mykinesfirði fp. | sp. | Nólsoyarfirði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvannasundi fp. | sp. | Fugloyarfirði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 18. aug | 09.15 | 21.35 | 08.15 | 20.35 | 08.30 | 20.50 | 11.15 | 23.35 | — | 12.15 | 07.30 | 19.50 | 06.30 | 18.50 | 09.30 | 21.50 | 10.30 | 22.50 | 09.00 | 21.20 | 10.15 | 22.35 |
| 19. aug | 09.54 | 22.13 | 08.54 | 21.13 | 09.09 | 21.28 | 11.54 | — | 00.35 | 12.54 | 08.09 | 20.28 | 07.09 | 19.28 | 10.09 | 22.28 | 11.09 | 23.28 | 09.39 | 21.58 | 10.54 | 23.13 |
| 20. aug | 10.32 | 22.52 | 09.32 | 21.52 | 09.47 | 22.07 | 00.13 | 12.32 | 01.13 | 13.32 | 08.47 | 21.07 | 07.47 | 20.07 | 10.47 | 23.07 | 11.47 | — | 10.17 | 22.37 | 11.32 | 23.52 |
| 21. aug | 11.13 | 23.34 | 10.13 | 22.34 | 10.28 | 22.49 | 00.52 | 13.13 | 01.52 | 14.13 | 09.28 | 21.49 | 08.28 | 20.49 | 11.28 | 23.49 | 00.07 | 12.28 | 10.58 | 23.19 | — | 12.13 |

5 707265 100036 >